# Dýrar kommunur

Tað fer at kosta 950 mió. krónur at reka tær føroysku kommunurnar næsta ár, og tað er 60 mió. krónur meiri enn í ár. Tað stendur at lesa í einari uppgerð, sum kommunudeildin hjá innlendismálaráðnum hevur gjørt. Uppgerðin vísir eisini, at íløgurnar hjá kommununum verða 470 mió. krónur í 2007 ella 170 mió. meiri enn í ár. Kommunuskuldin veksur 110 mió. krónur næsta ár, og tær skulu gjalda 27 mió. krónur í rentum í 2007.

# Góður útróður

Tað vignaðist væl hjá útróðrarbátunum í Klaksvík og Hvannasundi fyrradagin, nú veðrið var heldur frægari. Teir stóru bátarnir, sum seta millum 50 og 60 stampar, lógu um 10.000 pund, og teir smærru lógu millum 130 og 200 pund upp á stampin. Ein bátur í Hvannasundi hevði ein rættiliga góðan dag, tí teir avreiddu umleið 12.000 pund. Meginparturin av tí, sum bátarnir fingu, var hýsa, men ein triðingur var toskur og smáfiskur.



*Hesin toskurin er veiddur umborð á skipi. Um ikki so langa tíð verða væntandi teir fyrstu aldu føroysku toskarnir tiknir til sláturs og seldir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Mikkjal Hammer, stýrimaður og skipari umborð á Steintóri, er spentur upp á toskaalingina í Hvalba, sum Faroe Com Farm stendur aftanfyri*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

standa saman um toskaalingina, sum fer í gongd í Hvalba, fýra føroysk feløg og eitt norskt.

– Feløgini, ið eiga Faroe Cod Farme, sum er felagið aftanfyri toskaalingina, eru P/F Steintór, P/F TF Holding, Sparikassagrunnurin, P/F Tjaldur og norska felagið Eco-Farm.

Mikkjal Hammer vísir á, at stórur áhugi tykist vera fyri toskaaling í Føroyum, og tað eru feløg, sum síggja stórar møguleikar í hesum.

– Eg vil ikki siga, at tað, sum vit nú fara undir í Hvalba, er ein royndarverkætlan, men eitt fyrsta stig í eini møguligari størri ætlan.

Hann sigur, at Hvalbiarfjørður ikki er væl egnaður til aling, tí fjørðurin er so opin, at aliringar neyvan høvdu havt tað so gott á uppgangi á vetrardegi.

– Men vit halda, at ætlanin júst er sera spennandi, tí alingin verður í kørum á landi.

Mikkjal vísir á, at norðmenn hava ment eina tøkni, sum ger, at toskur kann



*Árnafjørður verður nú eisini karmur um toskaaling og sum skilst, er eitt samtak til reiðar at seta tey fyrstu toskasmoltini út*

*Mynd: Snorri Brend*

alast lutfalsliga bíliga á landi, og hann dylur ikki, at hann sær stórar møguleikar í hesi verkætlan sum er rættiliga áhugaverd og spennandi.

– Øll útlit eru til, at hetta verður ein góð loysn, og útlit eru somuleiðis til, at fiskurin helst fer at veksa skjótari, tá ið hann verður aldur uppi á landi. Tú fært eisini stýrt alingini øðrvísi uppi á landi, eitt nú við fóðuri, hita og luft.

## 40.000 toskasmolt

Mikkjal sigur, at ætlanin er at seta 40.000 toskasmolt út í kørini í Hvalba, og gongst sum ætlað, vigar fiskurin 4 kilo eftir 14 mánaðum.

Hann sigur, at neyðugt verður at hava "økonomi" í alingini, og tí er umráðandi, at fiskurin veksur skjótt og fæst tíðliga til sláturs.

Mikkjal veit at siga, at stórur vøkstur hevur verið í toskaalingini í Noregi, og okkurt norsk felag er vorðið so stórt, at felagið er komið á "børsin", sum hann tekur til.

– Jú, eg haldi, at tað er ein fyrimunur fyri okkum, at norðmenn eru við, tí teir hava longu drúgvar royndir í at ala tosk. Noreg selir nevniliga longu fleiri túsund tons av aldum toski um árið, og sum vit hava skilt, liggur prísurin um einar 35 krónur fyri kilo við ongum høvdi.

Hann sigur, at norðmenn eru so langt frammanfyri føroyingar í at ala tosk, og tá ið vit føroyingar eiga ein so góðan lívfisk, sum toskin á Føroyabanka, kann undra, at vit ikki eru komin longur við hesi aling.

– Men nú verður so skjøtil settur á, bæði á sjógvi og landi, sigur hann.

Mikkjal vísir á, at tá ið alingin í Hvalba er komin í gongd, fara teir at finna út av, hvussu nógvur fiskur kann ganga í kørunum, tá ið hann veksur til.

## Gera sær royndir

– Vit fara sum nevnt at taka ímóti 40.000 toskasmoltum, men sum vaksin fiskur rúmast neyvan meira enn 30.000 fiskar á 4 kilo í kørunum í senn. Hetta svarar til eina samlaða vekt upp á eini 120 tons.

Hann væntar, at til ber at taka nakað av fiski, áðrenn alt veksur til, soleiðis at tað ikki verður ov trongt í kørunum – og eisini ber til at flyta fisk ímillum kørini.

– Hinvegin mugu vit gera okkum tær royndir, sum skulu til. Tað kann jú vera, at okkurt verður øðrvísi, enn vit upprunaliga væntaðu.

Mikkjal vísir á, at tá ið alt verður í ringum á sjónum, vita menn, hvussu nógvan fisk teir kunnu hava fyri hvønn rúmmetur av sjógvi.

– Men á sjónum er streymur, og tá ið streymur stendur á nótina, minkar hon í vavi, og hugsandi er, at fiskurin treingist meira saman. Hinvegin eru rúmmetrarnir í kørunum á landi altíð teir somu alla tíðina.

## Manuel fóðring

Mikkjal Hammer sigur, at í byrjanini verða ikki fleiri fólk til arbeiðis við toskaalingini í Hvalba, og hann væntar, at fóðringin verður "manuel" í byrjanini.

– Vit skulu so hava fólk til at fóðra fiskin og ansa eftir, at alt er í lagi og gongur, sum tað skal, sigur hann.